## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 30 | 21 - 4 - 5 | 62 | 33 | 29 | 67 |
| 2 | Farum | 30 | 20 - 6 - 4 | 69 | 33 | 36 | 66 |
| 3 | HFK Sønderj. | 30 | 17 - 4 - 9 | 61 | 50 | 11 | 55 |
| 4 | Frem | 30 | 15 - 9 - 6 | 54 | 37 | 17 | 54 |
| 5 | Herfølge | 30 | 15 - 8 - 7 | 58 | 36 | 22 | 53 |
| 6 | Randers F. | 30 | 15 - 6 - 9 | 62 | 38 | 24 | 51 |
| 7 | AC Horsens | 30 | 12 - 8 - 10 | 39 | 31 | 8 | 44 |
| 8 | B 1913 | 30 | 11 - 10 - 9 | 42 | 49 | -7 | 43 |
| 9 | FC Aarhus | 30 | 11 - 9 - 10 | 42 | 42 | 0 | 42 |
| 10 | Hvidovre | 30 | 8 - 8 - 14 | 43 | 52 | -9 | 32 |
| 11 | Fredericia | 30 | 7 - 9 - 14 | 45 | 46 | -1 | 30 |
| 12 | B 1909 | 30 | 8 - 5 - 17 | 46 | 67 | -21 | 29 |
| 13 | Brønshøj | 30 | 7 - 7 - 16 | 42 | 63 | -21 | 28 |
| 14 | B93 | 30 | 7 - 7 - 16 | 37 | 59 | -22 | 28 |
| 15 | Kolding FC | 30 | 7 - 6 - 17 | 45 | 65 | -20 | 27 |
| 16 | Skive | 30 | 3 - 6 - 21 | 36 | 82 | -46 | 15 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre),
Johan Byrial Hansen (Fredericia)

## Norska tippeligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lyn | 12 | 9 - 1 - 2 | 20 | 14 | 6 | 28 |
| 2 | Molde | 12 | 8 - 2 - 2 | 23 | 8 | 15 | 26 |
| 3 | Odd. Grenl. | 12 | 7 - 1 - 4 | 19 | 14 | 5 | 22 |
| 4 | Rosenborg (M) | 12 | 6 - 3 - 3 | 23 | 13 | 10 | 21 |
| 5 | Våleranga | 12 | 5 - 4 - 3 | 22 | 13 | 9 | 19 |
| 6 | Viking | 12 | 5 - 4 - 3 | 23 | 17 | 6 | 19 |
| 7 | Stabæk | 12 | 5 - 4 - 3 | 19 | 13 | 6 | 19 |
| 8 | Bodø/Glimt | 12 | 4 - 2 - 6 | 16 | 15 | 1 | 14 |
| 9 | Brann | 12 | 4 - 2 - 6 | 15 | 22 | -7 | 14 |
| 10 | Lillestrøm | 12 | 3 - 4 - 5 | 11 | 14 | -3 | 13 |
| 11 | Bryne | 12 | 3 - 3 - 6 | 15 | 22 | -7 | 12 |
| 12 | Moss | 12 | 2 - 4 - 6 | 11 | 23 | -12 | 10 |
| 13 | Sogndal | 12 | 2 - 2 - 8 | 15 | 28 | -13 | 8 |
| 14 | Start | 12 | 1 - 4 - 7 | 11 | 27 | -16 | 7 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

# Hvidovre og Óli skiljast

**Feløgini hjá øllum trimum føroyingunum, sum hava spælt í næstbestu donsku deildini, halda fram í deildini**

1. DEILD DANMARK
*Jóannes Hansen*

Hvidovre hevur verið føroyska felagið í næstbestu donsku deildini síðsta hálva annað árið. Óli Johannesen hevur verið føroyska umboðið í felagnum, síðani hann flutti úr AGF og Århus og til Keypmannahavnar og Hvidovre.

Tað er púra greitt, at Óli Johannesen fer ikki at spæla við Hvidovre komandi kappingarár. Hvidovre hevur ikki pengar at skriva nýggjar sáttmálar eftir somu treytum, sum avtalurnar við spælararnar hava verið skornar eftir seinastu árini. Flestu spælararnir leita eftir øðrum feløgum, og tað ger Óli Johannesen eisini. Sambært Óla sjálvum er hann ikki í realitetssamráðingum við nakað felag í Danmark.

Um hann ikki fær sáttmála við nakað felag í Danmark ella okkurt felag aðra staðni í útlandinum enn í Danmark, so er ein møguleiki fyri, at Óli fer at leita sær heimaftur á klettarnar.


*Óli Johannesen hevur verið darvaður av skaðåa seinastu tíðina, skal nú binda frið, meðan leitað verður eftir einum nýggjum felagi at spæla fótbólt fyri*

Serliga á Tvøroyri verður nógv tosað um henda møguleikan, og kenslunum hjá Óla fyri barndómsfelagnum bila avgjørt einki, men tað er heilt víst, at um tað gongst, sum Óli vil, at tað skal ganga, so verður tað ikki nakað føroyskt felag, sum eftir summarsteðgin fer at fáa ágóðan av liðformanninum á landsliðnum.

Óli var á liðnum, tá Hvidovre sunnudagin spældi síðsta dystin í hesum kappingarárinum. Tað gjørdu teir á heimavølli ímóti Randers Freja. Atli Gregersen var á liðnum hjá Randers, sum vann 3–1 ímóti Hvidovre.

Óli hevur verið darvaður av skaða síðstu tíðina. Tí hevur hann ikki havt serliga góðar umstøður at gera vart við seg sjálvan. Tað, sum hann í løtuni hevur mest brúk fyri, er at binda frið og harvið at koma fyri seg aftur.

Tað var langt síðani greitt, at Skive skuldi flyta niður. Sunnudagin varð greitt, at hitt liðið, sum skal flyta niður, er Kolding. Teir flyta niður, sjálvt um teir í síðsta umfarinum vunnu 3–2 á heimavølli ímóti grannunum úr Fredericia, sum hava Johan B. Hansen á liðnum.

At sigurin hjá Kolding ikki var nóg mikið til at varðveita plássið í næstbestu deildini komst av, at B93 og Brønshøj á Eysturbrúgv spældu 1–1. Javnleikurin hevði við sær, at bæði liðini – undan síðsta umfarinum vóru tey bæði í niðurflytingarvanda – varðveita plássið. Hetta luktar eitt sindur av keypmannahavnarríi, halda teir yviri í Jyllandi.

Farum og Køge skulu loysa Vejle og Lyngby av í superliguni. Farum rundaði av við at vinna við ikki minni enn 7–0 í Odense ímóti B1913. Køge megnaði ikki meiri enn 3–3 á heimavølli ímóti FC Aarhus.

# Molde heldur fram at vinna


*Molde vann aftur um vikuskiftið, tá Stabæk var á vitjan, og enn halda teir rimmarfast í støðuni í oddinum*

**Munurin millum Molde á næstovasta plássinum og Odd á trið ovasta plássinum er nú fýra stig**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi hjá Molde. Sunnudagin høvdu teir vitjan av Stabæk. Gestirnir hava nógvu tær seinastu ferðirnar megnað at fingið stig við til hús úr Molde, men hesa ferð eydnaðist tað ikki. Eftir eitt javnt og tætt fyrra umfar, var munurin størri í 2. hálvleiki. Heimaliðið var omaná, og teir skoraðu sigursmálið í 63. minutti.

Jákup Mikkelsen var heldur ikki á liðnum hesa ferð. Mitt í síðstu viku spældi Molde í 2. umfari í steypakappingini. Teir vunnu sannførandi stórsigur, men heldur ikki ta ferðina fekk Jákup Mikkelsen møguleikan. Tað má kennast sera óhugaligt.

Lyn er framvegis oddalið. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Odd Grenland úr Skien, og har var einki at rafla um. Heimaliðið vann sannførandi 3–0 sigur. Hóast teir taptu stórt, so eru teir úr Skien framvegis á triðja plássi, men munurin aftur til Rosenborg, sum er á fjórða plássi, minkaði.

Rosenborg hevur hvørki víst sannførandi spæl ella havt sannførandi úrtøku fyrsta partin av hesum kappingarárinum. Hesa ferð var kortini eingin ivi. Í Tróndheimi høvdu teir vitjan av gamla føroyska liðnum, Sogndal, sum varð sent til hús við 3–0 tapi.

Hjá Start í Kristiansand gongst tað syndarliga. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Vålerenga, sum fór aftur til Oslo við øllum stigunum. Og tað skal valdast útisigur. Vålerenga vann 7–2, og Start er uppaftur meiri aftast, enn teir vóru undan vikuskiftinum. Hesa ferð mistu teir málverjan, sum sá reytt.

Lillestrøm var undan kappingarbyrjan roknað millum evnini til heiðurskrónur og NM, men tað hevur gingið sera illa hjá LSK. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Brann Bergen. Serliga í 2. hálvleiki hevði heimaliðið alt spælið, men teir fingu ikki mál, og so fóru gestirnir aftur til Bergen við øllum stigunum. Brann vann 1–0.

Moss hevði vitjan av Bodø/Glimt, sum fór longu leiðina norður aftur við 1–0 tapi í viðførinum, og Bryne og Viking spældu 3–3.

Komandi vikuskifti verður spælt soleiðis: Leygardagin spæla Odd Grenland og Lillestrøm. Sunnudagin: Bodø/Glimt–Start, Sogndal–Molde, Stabæk–Moss, Viking–Lyn og Vålerenga–Bryne.



# Clickhaze í stórformi





**Føroyski rockbólkurin er ovfarin av stóra áhuganum fyri nýggju fløguni, sum varð útseld beinanvegin**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Sunnukvøldið hevði Clickhaze konsert fyri mest sum fullsettum sali í mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík. Áhoyrararnir fingu eina framúr konsert við bólkinum, sum júst hevur givið sína fyrstu fløgu út. Manningin í Clickhaze tykist vera á toppinum tónleikaliga, samanspælið er betur enn nakrantíð, og sangirnir ómetaliga sterkir og orkufullir. Clickhaze spældi í ein tíma, og tey trivu í allar sínar kendu sangir. Um 10 dagar skal Clickhaze spæla á Roskilde Festivalinum, og síðani verður leiðin løgd til bæði tónleikafestivalin í Nibe og á Midtfyn. Skal konsertin í Atlantis takast sum barometur fyri framførlsunar, sum danir hava í væntu, so kann føroyski bólkurin fara at taka øll á bóli.

### Fløgan seld

Fríggjadagin kom nýggja fløgan hjá bólkinum, og fyrsta upplagið, sum var upp á 500 eintøk, varð selt beinanvegin. Fløgan fæst enn í fløgubúðum, men Clickhaze er sloppin av við allar fløgunar, og tað eru tey kløkk av.

- Áhugin fyri bólkinum er sera stórur. Vit eru ovfarin av, at at fløgan varð so væl móttikin, tað høvdu vit ikki roknað við, sigur Sólarn Solmunde, sum er umboðsmaður fyri bólkin.

Fleiri útvarpsstøðir í norðanlondum hava vent sær til bólkin fyri at fáa fløgur, sum tey kunnu spæla á teirra rásum, og líkt er til, at útlendski áhugin fyri bólkinum ikki fer at minka, nú bólkurin skal spæla á konsertum uttanlands.

## All That Rain spælir í Hósvík

**Rockbólkurin fer at spæla, tá stevna verður í sundalagnum komandi vikuskiftið**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

All That Rain er ikki so ofta á palli í løtuni, sum teir plagdu at vera í fjør, men teir hava tó eitt sindur av gongd í, og nú summarstevnurnar eru byrjaðar, hava boð verið eftir All That Rain aftur. Bólkurin spældi á bygdastevnuni á Strondum, og komandi vikuskiftið fara teir at spæla í Hósvík, har bygdastevna verður komandi vikuskiftið. All That Rain fer at spæla til dans í bygdahúsinum í Hósvík fríggjakvøldið frá kl. 23.00. Í sambandi við dansin verður samband til og frá høvuðsstaðnum. Fólk kunnu tekna seg á tlf. 223311 ella 217745.

## Clickhaze nýggjan bústað

Rockbólkurin Clickhaze hevur nú fingið sær nýggjan bústað á internetinum.

Í sambandi við nýggju útgávuna og konsertferðina hevur bólkurin latið upp eina almenna síðu á heimsumfatandi netinum.

Á heimasíðuni hjá Clickhaze ber til at lesa alskyns upplýsingar um bólkin og tíðindi verða borin um konsertir og annað.

Adressan er
www.clickhaze.net
*(pop.fo)*

# Trygvi á festivalar við Swing Slingers

**Føroyski trummusláarin skal í summar spæla á tveimum donskum tónleikafestivalum við stóra neoswing-bólkinum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Trygvi Restorff í Brekkunum er ein av tónleikarunum í bólkinum Swing Slingers, sum hevur fingið tvær spennandi uppgávur í summar. Talan er um Riverboat jazzfestivalin, sum verður hildin í døgunum frá 20. til 22. juni. Í august mánaði skal bólkurin spæla á Skanderborg festivalinum, sum telist millum teir størstu í Danmark.

– Tað verður ikki minst stuttligt at spæla á triðstørsta festivalinum í Danmark, sigur Trygvi. Swing Slingers er einasti bólkurin av sínum slagi í Danmark. 11 mans eru í bólkinum, og av teimum eru ikki færri enn seks blásarar. Bólkurin kryddar sín swing-tónleik við rockabilly og jump 'n jive. Swing-tónleikurin, sum var nógv frammi í 30'unum og 40'unum vinnur alt meira fram aftur, og Swing Slingers spælir eisini gamlar klassikarar, eitt nú Jump Jive and Wail, Caladonia, In the Mood og Minnie the Moocher.